gult cyan magenta svart

Áltjóða átakið hjá Amnesty International móti píning.

18. november í ár fer Amnesty International undir sítt triðja altjóða áltak móti píning , sum er eitt av endamálunum í viðtøkunum hjá felagsskapinum. Í hesum átakinum verður serlig áherðsla løgd á at arbeiða fyri at fyribyrgja píning, at forða fyri diskriminatión og at draga tey seku fyri rættin

Hvat er píning?
Stutt sagt, er píning likamlig ella sálarlig líðing, sum ein ella fleiri persónar valda einum við vilja, regluliga og fyrilitarleyst.. Í ST sáttmálanum frá 1987 móti píning ella aðrari grimmligari, ómenniskjaligari ella vanæruligari viðferð ella revsing stendur í grein 1:
Píning er einhvør gerð, sum tilætlað valdir einum persóni ringa pínu ella líðing, antin likamaliga ella sálarliga, við tí endamáli

- *at fáa fatur á upplýsingum frá persóninum sjálvum ella einum triðja persóni ella*
- *at fáa persónin til at viðganga seg sjálvan ella ein triðja persón sekan ella*
- *at revsa hann fyri eina gerð, sum hann sjálvur ella ein triði persónur hevur framt ella er undir illgruna fyri at hava framt ella*
- *at ræða ella noyða hann ella ein triðja persón ella*
- *av onkrari orsøk, grundað á mismun ella mannamun, tá ein slík pína verður elvd av ella eftir boðum frá einum alment settum ella einum persóni, sum virkar embætis vegna ella við samtykki ella játtan frá einum slíkum persóni.*

Pína ella líðing, sum bert er náttúrlig ella tilvildarlig avleiðing av lógligum revsiltøkum er ikki umfatað.

Endamálið við píning

Í okkara tíð er píning serliga eitt politiskt amboð, sum hjálpir valdsharrunum at varðveita eftirlitið og kanska eisini valdið. Vit vita í dag, at høvuðsendamálið við píning er at oyðileggja persónin, sum verður píndur, soleiðis at hann ongantíð verður hin sami aftur. Hetta síggja vit ferð eftir ferð á hjálpi- og viðgerðarstovnunum fyri tey, sum yvirliva píningina. Millum tey, ið yvirliva, eru fólk, sum á einhvønn hátt hava gjørt vart við seg í egnum landi. Tey hava ofta barst ímóti órættvísi og kúgan og fyri demokratiskum rættindum. Ella tey hava eina aðra politiska ella átrúnarliga áskoðan, enn hon, íð valdar.

Frágreiðingin hjá Amnesty international um píning

Sambært frágreiðingum frá Amnesty International og øðrum mannarættindafelagsskapum er píning nógv øktur seinastu árini. Alt fleiri lond nýta pínining, uttan mun til hvør stýriskipan er. Oftast fer hann fram í loyndum, og píningarhættirnir broytast, soleiðis, at tað ofta er torført beinleiðis at síggja avleiðingarnar og tí eisini at revsa tey seku. Amnesty International sigur í nýggju frágreiðingini, sum er grundað á upplýsingar úr 195 londum frá 1997 til mitt í ár 2000, at píning er farin fram í meira enn 150 londum, og í meira enn 80 londum er fólk deyð av viðferðini. Flestu fráboðanirnar eru um fólk, sum eru pínd av embætismonnum undir avhoyringum í varðhaldi. Orsøkin til píningina sigst vera at varðveita rættartrygdina. Tey píndu eru ofta fólk, sum hava brotið lógina ella eru undir illgruna fyri at hava brotið lógina. Úr meira enn 70 londum eru fráboðanir um politiskar fangar, sum eru píndir. Tað eru bæði kvinnur og menn, ung og gomul.

Píningarhættir

Sambært frágreiðingini er vanligasti píningarhátturin buking, sum fráboðanir eru um úr meira enn 150 londum. Fólk eru sligin antin við berum nevum ella við ymiskum amboðum. Avleiðingarnar fyri offrini eru merkir og sár, innaru bløðingar, brotin bein, leysar tenn, oyðiløgd gøgn og stundum deyði.

Neyðtøka og kynslig misnýtsla er umfatandi, seliga av kvinnum og gentum. Aðrir vanligir pínagarhættir eru elektriskir stoytir (fráboðað úr meira enn 40 londum) sláing undir iljarnar (fráboðað úr meira enn 30 londum), kvaling (fráboðað úr meira enn 30 londum).

Fráboðanir eru eisini um fólk, har høvdið er hildið undir vatn, sum er dálkað av skarni og øðrum, til tey eru um at drukna, onnur, sum eru brend við sigarettum, ella bundin afturúr einum bili og dragsaði avstað. Fleiri eru ikki sloppin at sova í fleiri samdøgur. Onnur eru læst inni í ljóð- og ljóstøtt rúm og hava als onki samband havt við nakran persón í langa tíð, so tey missa dagaskil og áðrenn langt er fráliðið eisini skilið.

Hættirnir eru mangir, men alt fleiri leggja seg nú eftir at nýta amboð, sum hava við sær ógvuliga pínu, uttan sjónligar avleiðingar, og tí heldur ikki kunnu prógvast. Her kann nevnast stoytbeltið, sum verður nógv nýtt í USA. Tað er fjarstýrt og kann setast í gongd 100 metrar frá honum, ið hevur tað um. Tað gevur ein elektriskan stoyt uppá 50.000 volt, sum varir í 8 sekund. Fyrstu fáu sekundini viðførir tað lemjing og síðani ræðuliga pínu, sum spakuliga økist. Mangar fyritøkur hava lagt seg eftir at framleiða elektrisk píningaramboð. Amnesty International upplýsir, at meira enn 120 fyritøkur í 22 londum framleiða, marknaðarføra og selja elektrisk amboð, sum beinleiðis og einans eru konstrueraði til at pína fólk við.

Offrini

Øll kunnu gerast offur fyri píning, uttan mun til kyn, aldur, etniskan uppruna ella politiska áskoðan. Tey flestu, sum stjórnarembætismennirnir pína, eru tó lógbrótarar ella undir illgruna fyri lógarbrot. Tað góðtaka tey flestu eisini meira ella minni. Tað eru heldur ikki um tey tær flestu fráboðanirnar eru.

Píning hevur við sær diskriminatión. Tað er léttari hjá honum, sum pínir, at pína onkran, sum er minni virdur millum manna. Onkran úr einum vanvirdum sosialum, etniskum ella politiskum bólki.

Tað er heilt klárt samband millum rasismu og píning. T.d eru fleiri um ikki tey flestu, sum verða pínd av løgregluni bæði í USA og Europa svørt ella úr øðrum etniskum minnilutum. Kringum í Europa eru sigoynarar vanliga hildin at vera lógbrótarar og verða oftani bukaði.

Upprunafólk í USA hava verið offur fyri píning í marknatrætum. Í Australia doyggja ótrúliga nógv innfødd av ringari viðferð í fongslum.

Flóttar og fólk, ið flyta undan ófriði og hóttanum úr sínum egna landi fyri at leita sær friðskjól og arbeiði aðrastaðni, eru serliga hótt í so at siga øllum londum.

Píning og onnur vanærulig viðferð, grundað á kynsligan samleika, er ein heimsumfatandi trupulleiki. Meðan summi lond nokta seg sek í at pína samkynt, tvíkynt ella transvetittar, viðganga onnur, at tey gera tað samsvarandi lógum, morali og átrúnaði í landinum.

Børn

At vera barn ella ungur er ongin forðing fyri at verða píndur. Seinastu 3 árini eru frásagnir úr minst 50 londum, har stjórnarembætismenn pína børn ella fara illa við teimum

Børn í varðhaldi eru serliga í vanda fyri, at bæði løgreglumenn og aðrir fangar neyðtaka tey og misnýta tey kynsliga.

Børn, sum liva á gøtuni, liva av at bidda,stjala og lata seg kynsliga misnýta. Tey enda ofta í fongsli, og fleiri frásagnir eru um, at fólka gjalda fyri at fáa tey ruddaði av gøtuni sum annað órudd. Í vapnaðum bardøgum verða børnini ofta álopin og dripin, tí at tey umboða framtíðina.

Mangar fráboðanir eru, serliga úr londum í Afrika, har børn verða tikin sum barnasoldátar.Í ár er m.a komin ein drúgv frágreiðing um barnasoldátar í Sierra Leone.

Kvinnur

Síðan 1997 hevur Amnesty International fingið fráboðanir úr meira enn 50 londum í øllum heimspørtum, har stjórnarembætismenn neyðtaka kvinnur og misnýta tær kynsliga. Allarhelst er hetta talið nógv hægri, tí misbrotini verða ofta ikki meldaði. Størsti parturin av flóttum eru kvinnur. Tær eru serliga í vanda í flóttarlegunum og við landamørkini. Fráboðanir eru um kvinnur, sum flýddu úr Eystur Timor til flóttalegur í Vestur Timor. Indonesiskir heryvirmenn noyddu tær at arbeiða sum skøkjur og hildu tær sum sextrælir. Í Pakistan kann ein kvinna, sum er neyðtikin sjálv verða ákærd fyri hor, um hon ikki er før fyri at fáa 4 mannligar muslimar at vitna um, at hon ikki samtykti kynsliga samveru.

Endamálið við átakinum

Amnesty International heitir á øll lond í heiminum at vera við til at steðga píning. Víst verður til 12 greina yvirlýsingina móti píning, sum øll lond verða biðin um at halda. Undir heitinum: **Tak eitt stig til at útrudda píning**, verða vit øll, tú og eg, biðin um at gera okkara til at steðga píning.

Amnesty International heldur tað vera av avgerandi týdningi at steðga tí mismuni, sum verður gjørdur á fólki, soleiðis at øll hava rætt til somu rættartrygd og viðferð, uttan mun til hvønn húðalit tey hava, hvat kyn tey hava, ella hvørja politiska ella átrúnarliga áskoðan tey hava.

Amnesty International heitir eisini á allar stjórnir um at draga tey fyri rættin, sum eru sek í píning. Tað avskeplar samfelagið, um slíkar valdsgerðir ikki fáa avleiðingar. Tað forðar framhaldandi píning at revsa tey seku.

Ein kvinna frá Tongo flýggjaði undan píning og bíðar nú eftir innferðarloyvi í USA

Albanskur flótti úr Kosovo

Høgra hond av einum tannáringi úr Somalia liggur á gøtuni. Drongurin var skuldsettur fyri at hava hótt eina kvinnu og tikið hálvan annan dollar frá henni

India

Drag teir, sum høvdu ábyrgdina av píningini av Angammal og manni hennara Guruviah, fyri rættin

Tað eru liðin meira enn tvey ár síðani Angammal varð handtikin, men enn líður hon kroppsliga og sálarliga av tí henni var fyri, meðan hon sat í varðhaldi.

Angammal og Guruviah vórðu handtikin í juli 1998, tí illgruni var um, at tey høvdu tikið ímóti tjóvagóðsi. Løgreglan kom til hús teirra í Madurei økinum í Tamil Nadu, um náttina meðan Angammal var einsamøll inni. Hon varð tikin við á løgreglustøðina á staðnum og haðani flutt til Oormechikulam løgreglustøðina, har hon varð hildin um náttina við bakbundnum hondum. Guruviah varð handtikin morgunin eftir. Bæði noktaðu fyri at hava nakran kunnleika til tjóvagóðsið.

Forhoyrið av teimum byrjaði 28. juli. Løgreglumenninir bakbundu hendirnar á hjúnunum, stillaðu tey upp móti bróstinum og bukaðu tey í rygg og afturpart við bambusstavum.

Hjúnini vórðu síðani aftur flutt til eina aðra løgreglustød, har tey fingu boð um at lata seg úr klæðunum. Tey vórðu leidd útum hvørt eftir annað og bukaði til Guruviah svímaði.

Inni aftur á stødini vórðu hjúnini hongd í ein enda úr loftinum og bukaði. Tá Angammal varð tikin niður, varð hon blakað í gólvið, framvegis nakin. Guruviah fekk at vita, at Angammal vildi verða skemd meðan hann hugdi at, um hann ikki viðgekk og segði hvar skartgripirnir vóru krógvaðir. Angammal varð sligin á bróstini og sparkað í skrevið. Tá Guruviah varð tikin niður blivu hjúnini noydd at latast sum um tey høvdu samlegu, meðan fleiri løgregluyvirmenn hugdu at.

Guruviah varð tikin til eina aðra løgreglustød, har løgreglumenn bukaðu hann, koyrdu pipar í eyguni á honum og gjøgnumgataðu hansara fingurneglir, táneglir og tungu við nálum.

Hin 2. august 1998 vórðu hjúnini tikin við til løgregluovastan. Hann varð so skelkaður av tí standi tey vóru í, at hann beinanvegin gav boð um, at flyta tey til eitt privat røktarheim. Guruviah doyði seinni um kvøldið av skaðunum, hann hevði fingið. Angammal varð dagin eftir flutt til eitt alment sjúkrahús, har hon varð verandi í tvær vikur.

Meira enn tvey ár aftaná at Angammal varð handtikin pínist hon framvegis bæði sálarliga og kroppsliga av tí henni var fyri í varðhaldinum.

Angammal stríðist enn við málið hjá sær við dómstólarnar og roynir at tryggja sær, at løgreglumenninir, sum høvdu ábyrgdina av at maður hennara doyði, verða dripnir fyri rættin og ákærdir. Fleiri umbønir eru undir viðgerð við yvirrættin í Tamil Nadu. Eisini ein umbøn um, at kanningin verður tikin frá tí lokalu løgregluni og latin kriminaldeildini á kriminalkanningarstovninum til viðgerar. Sjálvt um Angammal hevur sent klagu til mannarættindanevndina hjá statinum, hevur hon onki svar fingið.

Nógvar royndir hava verið gjørdar at fáa Angammal at tiga og at forða henni í at almannakunngera málið. Í august 1998 varð henni boðið 400.000 ruplar (80.000 krónur) um hon ikki tosaði við kanningardómaran, sum eftirkannar deyðan hjá makanum. Hon noktaði at taka av og gav eina nágreiniliga frágreiðing um tilburðin. Í januar 1999 gav landspartastjórnin í Tamil Natu Angammal 200.000 ruplar (40.000 krónur) sum endurgjald fyri deyða Guruviah.

At fólk í varðhaldinum heldur áfram at vera vanligt í øllum indiskum statum, meðan ofrini fyri píning framvegis hava ilt við at fáa sína sak roynda.

Tak eitt stig fyri at steðga píning

Tú kanst hjálpa til við at útrudda píning. Legg tína rødd afturat átakinum hjá Amnesty International.

Kvinnur mótmæla í Dhaka í Bangladesh píning av kvinnum í heimlandi teirra



Fangar í Brasil hava tað heldur ikki for gott

Skrá í tólv tættum til forðing fyri píning

Píning er grundleggjandi brot móti mannarættindum og er bannlýst av aðalfundi sameindu tjóða sum brot móti menniskjavirðum, einsvæl og bannað sambært tjóðarrætti og altjóða lóg.

Hóast hetta, vera menniskju dagliga pínd um allan heimin. Amnesty International hevur tær royndir, at ikki er nóg mikið við lógarbanni. Neyðugt er beinanvegin at fara í stríð móti píning og aðrari grimari, ómenniskjansligari og niðrandi viðferð ella revsing, sama hvar tær verða framdar, til tess at útrudda tey fullkomiliga.

Amnesty International heitir á allar stjórnir um at seta hesa skránna í verk til tess at útrudda píning. Áhugaðir einstaklingar og felagsskapir verða bodnir við at fremja ætlanina. Amnesty International heldur, at verður hendan skráin sett í verk, ber tað boð um, at stjórnirnar eru sinnaðar at taka av píning og at virka fyri at hetta verður gjørt um allan heimin.

1. **Almenn avsøgn av píning**
Ovastu myndugleikarnir í øllum londum eiga at sýna teirra fullu andstøðu móti píning. Teir eiga at gera øllum embætisfólkum, ið hava til starv at halda lóggávuna uppi, greitt, at píning verður ikki told undir nøkrum umstøðum.

2. **Avmarking av fongsling í avbyrging**
Fólk verða ofta pínd, meðan tey sita avbyrgd í varðhaldi, og ikki fáa sett seg í samband við nakran uttanfyri at fáa hjálp ella fáa at vita, hvat fer at henda teimum. Stjórnirnar eiga at skapa trygd fyri, at tílík avbyrging ikki gevur møguleika fyri, at fangar verða píndir. Tað er av størsta týdningi, at allir fangar verða settir fyri ein dómara beinanvegin eftir, at teir eru handtiknir, og at skyldfólk, sakførarar og læknar uttan drál fáa regluliga atgongd til teirra.

3. **Eingi loynilig fongsul**
Í summum londum verða fólk pínd í loynliligum varðhaldum eftir at tey eru »horvin«. Stjórnirnar eiga at tryggja, at fangar verða havdir í alment viðurkendum støðum, og at sannar upplýsingar verða givnar skyldfólki og sakførarum teirra.

4. **Trygdartiltøk undir avhoyring og í varðhaldi**
Stjórnirnar eiga regluliga at endurskoða mannagongdirnar fyri varðhaldi og avhoyringum. Allir fangar eiga beinanvegin at fáa at vita, hvørji rættindi teir hava, heruppí eisini rætt til at klaga um ta viðferð, teir fáa. Regluligt eftirlit av óheftum eftirlitsfólkum eigur at vera við varðhaldsstøðum. Ein týdningarmikil trygd móti píning er, at teir myndugleikar, ið hava ábyrgdina av varðhaldi og avhoyringum, eru sínámillum óheftir.

5. **Óheftar kanningar av frágreiðingum um píning**
Stjórnirnar eiga at tryggja, at allar klagur og frágreiðingar um píning verða gjølla kannaðar av óheftum fólki. Kanningarháttur og úrslit eiga at verða kunngjørd. Tey, ið klaga, eins og vitni eiga at verða vard móti yvirgangi.

6. **Frágreiðingar, givnar undir píning, mega ikki verða brúktar**
Stjórnirnar eiga at tryggja, at játtanir um at vera sekur ella onnur prógv, fingin til vega undir píning, ongantíð verða brúkt í rættarmálum.

7. **Píning eigur at verða bannað við lóg**
Stjórnirnar eiga at tryggja, at píning er revsiverð sambært revsilógini. Sambært altjóðarætti má bann móti píning ikki verða sett úr gildi undir nøkrum umstøðum, eiheldur í krígstíð ella í undantaksstøðu.

8. **Tey, ið hava gjørt seg sek í píning, eiga at verða revsað**
Tey, ið hava framt píning, eiga at verða rættarsøkt. Hendan grundreglan eigur at verða fylgd, sama hvar brotsverkið varð framt og sama hvønn tjóðskap brotsmaðurin ella ofrið hava. Tað eigur ikki at finnast nakar griðstaður fyri tílíkar brotsmenn.

9. **Útbúgving**
At píning er brotsverk eigur at vera ein partur av upplæringini av øllum embætisfólkum, ið hava við varðhald, avhoyring og viðgerð av fangum at gera. Tey eiga at fáa at vita, at tey hava skyldu til at sýta fyri at líða boð um at pína fangarnar.

10. **Endurgjald og uppreising**
Offur fyri píning og teirra avvarðandi eiga at hava rætt til endurgjald. Ofrini eiga at fáa læknahjálp og uppreising

11. **Altjóða tiltøk**
Stjórnirnar eiga at sýta fyri øllum sambandi við stjórnir, ið nýta píning, ið kann tulkast sum at borið verður í bøtuflaka fyri teimum. Altjóða mannagongdir eiga at verða skipaðar og brúktar til bráðfeingis kanning av skuldsetingum um píning og munagóð fyribyrgingartiltøk. Stjórnirnar eiga at tryggja sær, at veiting av hernaðar-, trygdar- ella løgregluhjálp ella upplæring til onnur lond ikki kann medvirka til at píning verður framd.

12. **Staðfesting av altjóða sáttmálum**
Allar stjórnir eiga at staðfesta sáttmálar, ið fremja trygd móti og fyribyrging fyri píning, heruppí Altjóða semingin um borgaralig og stjórnmálalig rættindi og Valfrælsa gerðaskjalið til semingin, ið hevur reglur um einstaklinga kærurætt.

gult cyan magenta svart